FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

| | | |
|---|---|---|
| **FMR-Vegleiðing** | Dato | 24. juni 2015 |
| **Til: Stjórnarráðini og stovnar landsins** | | **FMR j.nr. 15/00403** |
| **Heiti: Vegleiðing um støðling og afturgjald av stuðuli** | | |

**Endamál**
Henda vegleiðing er ætlað til stjórnarráð og stovnar, sum umsita stuðulsjáttanir, og ásetir hvussu arbeiðast skal við støðling og afturgjald av stuðuli.

**Allýsing**
Støðling er at flyta upphædd yvir til fíggjarstøðuna, í hesum førinum ikki útgoldnar bindandi tilsagnir um stuðul, sum eru veittar í fíggjarárinum. Upphæddin verður útreiðsluførd á játtanini í fíggjarárinum, og gerst tøk til útgjaldingar á fíggjarstøðuni, óheft av fíggjarárinum.

Um veitt tilsøgn um stuðul dettur burtur, har upphæddin er flutt til fíggjarstøðuna, skal upphæddin inntøkuførast aftur á játtanina í fyrsta fíggjarári, sum opið er.

**Heimild**
Í kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan er ásett:

**§ 11.** Tilsøgn um stuðul skal útreiðsluførast í tí fíggjarári, har bindandi tilsøgn er givin, uttan mun til, um goldið verður út heilt ella partvíst í seinni fíggjarári, sbrt. § 24, stk. 3, 1. pkt. í lógini.
*Stk. 2.* Ikki útgoldnar tilsagnir verða fluttar yvir til fíggjarstøðuna, sbrt. § 24, stk. 3, 2. pkt. í lógini.

**§ 23.** Veittar tilsagnir detta burtur, og útgoldin stuðul eigur at verða kravdur afturgoldin, í síðsta lagi við árslok árið eftir, at tilsøgnin varð givin, um stuðulsmóttakarin ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa stuðul, ella ikki er førur fyri at fremja avtalaða virksemið á nøktandi hátt.
*Stk. 2.* Útgoldin stuðul kann eisini verða kravdur afturgoldin, um avlop er í mun til avtalaða virksemið.

**Slag av virksemi**
*A) Er talan um alment virksemi, sum sjálvsognarstovnur ella felagsskapur útinnar*
Útgangsstøði er, at stuðulin verður viðfarin eins og rakstrarjáttan í fíggjarlógini, tvs. avlop skal aftur í landskassan.

*B) Er talan um framhaldandi felagsvirksemi við almannagagnligum endamáli*
Útgangsstøði er, at stuðulin verður óskerdur latin feløgunum. Er talan um avmarkingar í virksemi ella avtalað virksemi í viðmerkingunum til játtanina ella í sjálvari tilsøgnini, so kann talan verða um afturgjald, um hetta ikki er uppfylt.

Hugsast kann heldur, at lagt verður upp til lækking av árligu játtanini, um talan áhaldandi er um avlop í rakstrinum hjá stuðulsmóttakara.

*C) Er talan um stuðul til vinnulig endamál*
Útgangsstøði er, at stuðulin verður rindaður í mun til avtalað virksemi, og verður kravdur afturgoldin, um hetta ikki er uppfylt.

*D) Er talan um eingangs stuðul til felagsskap, bólk ella einstaklingar*
Útgangsstøði er, at stuðulin verður rindaður í mun til avtalað virksemi, og verður kravdur afturgoldin, um hetta ikki er uppfylt.

Kvíggjartún 1 • Box 2039 • 165 Argir
☏ (+298) 35 20 20 • 🖷 (+298) 35 20 25 • ✉ fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Skráseting**
Er talan um stuðulsjáttan við móttakaraskara, t.e. har fleiri enn ein móttakari er, kann stuðul afturgoldin í sama fíggjarári, sum tilsøgnin er givin, verða skrásettur við øvugtum fortekni á somu standardkontu sum tilsøgnin, soleiðis at upphæddin kann útreiðsluførast aftur í fíggjarárinum, sum tilsøgn til nýggjan stuðulsmóttakara.

Stuðul afturgoldin í seinni fíggjarári enn tilsagnin varð latin verður skrásettur á standardkontu 64. Aðrar flytingarinntøkur á stuðulsjáttanini, og kann ikki útreiðsluførast til nýggjar stuðulstilsagnir. Við hesum kemur greitt fram í hvønn mun talan er ávikavist um útreiðsluførslu av stuðuli og afturgjald av stuðuli.

Fíggjarmálaráðið, 24. juni 2015

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ **Bjarni Askham Bjarnason**
aðalstjóri